**Býráðsfundur mánadagin 06. juni 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen, Hans Mourits Foldbo

**Fundurin lokin kl. 23.45**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **16/00000**<br>**Innkallan av varalimi**<br>Árni Jacobsen hevur boða frá at hann ikki kann møta á fundi. Borgarstjórin hevur innkalla næstvalda á lista C, sum er Hans Mourits Foldbo. | Einmælt samtykt at Hans Mourits Foldbo tekur sæti fyri Árna Jacobsen. |
| 2. | **16/00167**<br>**Umsókn um at keypa matr. nr. 194a í Leirvík (matrikulin millum matr. nr. 316 og 319)**<br>Ánarin av matr. nr. 3016 og 319 hevur biðið um ummæli til keyp av matr. nr. 194a ið er 135 m$^2$ til støddar.<br><br>Eysturkommuna skal geva sítt ummæli til umsóknina.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at viðmæla umsókn frá Eirikur á Húsamørk um at keypa matr. nr. 194a sum liggur í millum matr. nr. 316 og 319. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini. |
| 3. | **16/00159**<br>**Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 15 til ummælis**<br>Búnaðarstovan hevur sent málið um sundurbýti til ummælis. Umsóknin fevnir um sundurbýti av matr. nr. 15, sum hoyrir til festini matr. nr. 12a og 13a, ið ávikavist Árant Hansen og Henning Olsen sita við.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at viðmæla sundurbýti av matr. nr. 15 sambært umsókn frá Árant Hansen | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini. |
| 4. | **16/00178**<br>**Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 198b til leigugrund BJ Hammer, Norðregøtu**<br>Í sambandi við at BJ Hammer byggir vinnubygning í Norðragøtu á leiguøki hjá Eysturkommunu, skal sundurbýti fremjast við atliti til leigumálið. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini. |

**Býráðsfundur mánadagin 06. juni 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen, Hans Mourits Foldbo

**Fundurin lokin kl. 23.45**

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at gera sundurbýti av matr. nr. 198b til leigugrund hjá BJ Hammer í Norðragøta.

**5. 16/00179**

**Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 198b til endurnýtlsu hjá Eysturkommunu í Norðragøtu**

Eysturkommuna hevur gjørt øki til endurnýtlu og skal biðja um at fáa økið sundurbýt av matr. nr. 198b í Norðragøtu.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at gera sundurbýti av matr. nr. 198b til endurnýtlsu hjá Eysturkommunu Norðragøta.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**6. 16/00180**

**Umsókn um marknaumskipan til Tavuna og Føroya Bjór í Leirvík**

Í sambandi við at Tavan og Føroya Bjór hava útbygt teirra virkir, skal marknaumskipan fremjast við atlti til leiguøkið.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at gera marknaumskipan frá matr. nr. 169a til Tavuna matr. nr. 173 og frá matr. nr. 169a til Føroya Bjór matr. nr.169c.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**7. 16/00192**

**Ummæli til keyp av jørð frá haganum Uppi í Dal í Norðragøtu matr. nr. 196a, eigari matr. nr 86a.**

Í sambandi við at SEV skal byggja koblingstøð við Leirvíksvegin, í festinum hjá Janus Joensen, hevur Búnaðarstovan biðið um ummæli frá kommununi

Umsitingin mælir til at viðmæla umsóknini um keyp av jørð.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum umsitingini.

**8. 16/00032**

**Leigusáttmáli um niðaru hædd av Gøtubrá – AMR**

Stuðulstænastan undir Almannamálaráðnum hevur leiga ein part av Gøtubrá í fleiri ár. Sáttmálin gekk út 1. januar 2016, og AMR ynskir

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini

*Emma Rasmussen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

**Býráðsfundur mánadagin 06. juni 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen, Hans Mourits Foldbo

**Fundurin lokin kl. 23.45**

framhaldandi at leiga hølini, og hevur sent Eysturkommu uppskot um nýggjan sáttmála. Málið var til viðgerðar í fíggjarnevndini tann 24. februar 2016, har nevndin einmælt samtykti at beina málið í trivnaðarnevndina.

Málið var til viðgerðar í Trivnaðarnevndini tann 15.mars 2016, har nevndin mælti til at sáttmálin verður sendur til Stýrið fyri Heimatænastuni til ummælis.

Viðmerking frá leiðaranum fyri Nánd:

Sum áður fráboðað, hevur Nánd tørv á hølunum í kjallaranum. Tá demensdeildin lat upp, varð hetta at síggja sum ein stutttíðar loysn, millum annað tí hølini ikki vóru optimal. Um demensdeildin fær atgongd til kjallarahølini, verða tvey demensbúpláss tøk á deildini, harav tað eina eigur at verða eitt umlættingarpláss.

Stýrið fyri Heimatænastuna NÁND er samt um, at mæla Eysturkommunu frá at leingja sáttmálan, tí Nánd hevur tørv á hølunum.

Málið er so aftur viðgjørt í trivnaðarnevndin tann 17. mei 2016 og mælir trivnaðarnevndin frá at leingja sáttmálan, við tí grundgeving, at Heimatænastan NÁND hevur brúk fyri hølunum.

Fíggjarnevndin mælir til at leingja verandi sáttmála fyribils til 1. januar 2018.

**9. 15/00420**

**Fyrispurningur um keyp av úthúsi og matr. nr. 144 í Syðrugøtu**

Fyrispurningurin um keyp av matriklinum er umrøtt og viðgjørt nakrar ferðir. Málið var seinast viðgjørt á býráðsfundi tann 4. apríl 2016 og samtykt var at biðið var um at fáa málið viðgjørt í ferðslunevndini.

Málið var fyri á ferðslunevndarfundi tann 11. maj 2016, og mælir nevndin til at keypa matr. nr. 144 við ástandandi úthúsi og taka húsið niður við atliti

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 06. juni 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen, Hans Mourits Foldbo

**Fundurin lokin kl. 23.45**

til ferðslutrygdina.

Eingin játtan er til keyp av matriklinum v.m. og verður biðið um eykajáttan.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum frá ferðslunevndini og keypa stykkið matr. nr. 144 við ástandandi úthúsi.
Byggi- og býarskipanarnevndin mælir eisini til eykajáttan uppá 150.000,00 kr. íroknað tinglýsing og niðurtøku av úthúsinum.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini. Peningurin til eykajáttan verður tikin av innistandandi.

**10. 16/00158**

**Umsókn um keyp av jørð matr. nr. 57ae í Norðragøtu**

Eysturkommuna hevur móttikið fyrispurning um keyp av øki, uml. 130 m$^2$ av matr. nr. 57q í Norðragøtu, ið liggur norðanfyri matr. nr. 57ae.

Upplýst er at endamálið er at víðka um havan norðureftir.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir frá at selja part av matr. nr. 57q, men mæla til at geva loyvi at planta norðureftir.

Skal kommunan seinni brúka økið, er tað eigarin av matr. nr. 57ae sum ber henda kostnaðin.ilmæli frá byggi- og býarskipanarnevndini fyriliggur til fundin

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

*Hjalti Dalheim var úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

**11. 16/00048**

**Umsókn um vinnuøki í Gøtudali, ASJ Sp/f**

Umsóknin er umrødd á fundi við umsøkjaran og fyribils tekningar eru móttiknar til staðseting av bygningi norðast á økinum, stykki nr. 1, og biðið er um ein matrikul uppá uml. 1000 fermetrar.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini, vinnunevndini og fíggjarnevndini

# Fundarbók hjá Eysturkommunu ________/________ Síða
# 520 Leirvík



**Býráðsfundur mánadagin 06. juni 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen, Hans Mourits Foldbo

**Fundurin lokin kl. 23.45**

Støðutakan at geva ASJ Sp/f tilsøgn uppá stykkið nr. 1 við tíðarfreist uppá 3 mánaðir frá samtykt býráðsins til at senda endaliga umsókn um byggiloyvi. Verður henda tíðarfreist ikki hildin, fellur stykki aftur til Eysturkommunu.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at geva ASJ Sp/f tilsøgn um stykkið nr. 1 við tíðarfreist uppá 3 mánaðir frá samtykt býráðsins at senda endaliga umsókn um byggiloyvi.

Vinnunevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og vinnunevndini.

**12. 14/00096**
**Plátuverkstaður í Norðragøtu, Gøtudali**

Umsóknin við fyribils tekningum frá Sp/f Bjørg er umrødd á fundi við umsøkjaran sum hevur sent fyribils tekningar við ynski um, at fáa tillutað stykkið sum liggur sunnast á planeraða økinum í Gøtudali, stykkini fevna uml. nr. 6 og 7. Umsøkjari hevur ikki tikið avgerð um støddina, men arbeitt verður við uml. 2000 – 3000 fermetrum.

Støðutakan at geva Sp/f Bjørg tilsøgn uppá stykkið nr. 6 og 7 við tíðarfreist uppá 3 mánaðir frá samtykt býráðsins til at senda endaliga umsókn um byggiloyvi. Verður henda tíðarfreist ikki hildin, fellur stykki aftur til Eysturkommunu.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at geva Bjørg Sp/f tilsøgn um stykkið nr. 6 og 7, ella um 2000 – 3000 fermetrar og við tíðarfreist uppá 3 mánaðir frá samtykt býráðsins at senda endaliga umsókn um byggiloyvi.

Vinnunevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini

**Býráðsfundur mánadagin 06. juni 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen, Hans Mourits Foldbo

**Fundurin lokin kl. 23.45**

Vinnunevndin mælir samstundis til, at umsitingin setur seg í samband við Sp/f Bjørg um nærri staðseting. Her verður hugsa um, at dentur verður lagdur á, at størri parturin av stykki 6 og 7 eru framsýningarvinarlig oman ímóti landsvegnum

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini.

**13. 16/00174**

**Asfaltering og liðugtger av økjum**

Eingin játtan er til asfaltarbeiði í 2016 og verður tí henda umsókn gjørd fyri at gera nøkur arbeiði liðugt og at umvæla og bøta um vegir í Eysturkommunu.

Eingin játtan er til asfaltering í ár og verður mælt til eykajáttan uppá kr. 520.000,00.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at fáa eykajáttan uppá kr. 520.000,00 til asfaltering og liðugterð av nøkrum økjum í bygdunum sum fyriskrivað.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini. Peningurin til eykajáttan verður tikin av innistandandi.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**14. 13/00394**

**Fríðkan av økinum omanfyri neystini í innara Bug í Leirvík**

Borgari hevur gjørt og arbeiðir við at fríðka um økið úti í Bug og fram við Mataránni. Eysturkommuna er partur í hesari verkætlan sum nú verður framd.

Málið verður tikið fram við áheitan um at gera sunnaru síðu á Mataránni, tí at norðursíðan og økið norðanfyri ánna er umvælt og fríðka við grótlaðing og bomsturbetum. Fyrispurningur er settur til grótlaðaran um mettan kostna at laða sunnaru síðu á ánni fyri at gera arbeiði liðugt og fullfíggja.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 06. juni 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen, Hans Mourits Foldbo

**Fundurin lokin kl. 23.45**

Játtan er ikki til hesa íløgu á fíggjarætlanini fyri 2016, og verður biðið um eykajáttan uppá kr. 200.000,00 til hetta arbeiði.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at gera grótlaðing og fylgja upp á arbeiði, men eisini fáa eitt uppskot frá umsitingini uppá grótgarðin. Byggi- og býarskipanarnevndin mælir eisini til at fáa eykajáttan uppá 200.000,00 kr.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini. Peningurin til eykajáttan verður tikin av innistandandi.

**15. 16/00181**

**Fyrispurningur um keyp av jørð frá kommununi, part av litra m ið er Regnavegur**

Eigarin av matr. nr. 331 hevur sett fyrispurning um at keypa tann grøna blettin norðanfyri hús hennara, sum er partur av litra m, Regnarvegur.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at ganga umsoknini á møti og selja partin av litra m.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**16. 16/00162**

**Góðkenning av roknskapi fyri 2015 hjá Kongshavnar havn**

Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna fyriliggjandi roknskap.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**17. 16/00141**

**2. viðgerð av eykajáttan til gongubreytir heildarætlan**

Á býráðsfundi tann 2. mei bleiv samtykt at veita eykajáttan á kr. 250.000,00. Peningurin verður tikin av innistandandi.

Eingin broyting er frá 1. viðgerð.

Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eins og samtykt við 1. viðgerð.

Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð.

**Býráðsfundur mánadagin 06. juni 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen, Hans Mourits Foldbo

**Fundurin lokin kl. 23.45**

**18. 15/00380**

**2. viðgerð av eykajáttan til "Tilhaldspláss á Krossteigum í Leirvík – Grøni kílin"**
Á býráðsfundi tann 2. mei bleiv samtykt at veita eykajáttan á kr. 90.000,00. Peningurin verður tikin av innistandandi.

Eingin broyting er frá 1. viðgerð.

Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eins og samtykt við 1. viðgerð.

Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð.

**19. 15/00352**

**2. viðgerð av eykajáttan til gongugøtur**
Á býráðsfundi tann 2. mei bleiv samtykt at veita eykajáttan á kr. 600.000,00. Peningurin verður tikin av innistandandi.

Eingin broyting er frá 1. viðgerð.

Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eins og samtykt við 1. viðgerð.

Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð.

**20. 16/00129**

**2. viðgerð av eykajáttan til keyp av sløkkiliðsbili**
Á býráðsfundi tann 2. mei bleiv samtykt at veita eykajáttan á kr. 1. mió. kr. Peningurin verður tikin av innistandandi.

Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eins og samtykt við 1. viðgerð.

Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð.

**21. 16/00185**

**Góðkenning av roknskapi fyri 2015 hjá Eysturkommunu**
Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna fyriliggjandi roknskap.

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**22. 16/00007**

**Nýggjur dagstovnur í Eysturkommunu**
Á seinasta býráðsfundi tann 2. mei 2016 bleiv samtykt at taka undir við tilmælium hjá meirlutanum í trivnaðarnevnidni um at bygd verður afturat verandi dagstovni við Gøtugjógv, vísandi til uppskot frá umsitingini.

Fyrst var atkvøtt um tilmæli hjá meirlutanum í trivnaðarnevnidini og atkvøtt var soleiðis:

**Býráðsfundur mánadagin 06. juni 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen, Hans Mourits Foldbo

**Fundurin lokin kl. 23.45**

Umsitingin mælir í hesum sambandi til at ein arbeiðsbólkur verður settur at gera uppskot til dagstovn.Umsitingin mælir til ein bólk við 5 limum, sum er samansettur soleiðis: Eitt politiskt umboð, leiðarin á Gjáa, eitt foreldraumboð ella starvsfólkaumboð, tvey umboð fyri leiðsluna í Eysturkommunu.

Meirilutin í trivnaðarnevndini, Emma Rasmussen og Ólavur F. Olsen, mæla til at bólkurin verður mannaður fylgjandi: Eitt politiskt umboð, leiðarin á Gjáa, eitt foreldraumboð, eitt starvsfólkaumboð og tvey umboð fyri leiðsluna í Eysturkommunu.

Minnilutin, Oluffa Joensen, mælir til at bólkurin verður mannaður fylgjandi: Tvey politiskt umboð, leiðarin á Gjáa, eitt foreldraumboð, eitt starvsfólkaumboð og eitt umboð fyri leiðsluna í Eysturkommunu.

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Ólavur Olsen, Emma Rasmussen

**Atkvøður ímóti:**
Oluffa Joenen, Hanus Jacobsen, Hanna Jensen.

**Akvøddi blankt:**
Brandur Jacobsen, Hjalti Dalheim, Hans Mourits Foldbo

Síðani bleiv atkvøtt um tilmæli hjá minnilutanum í trivnaðarnevndini, og atkvøtt var soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Oluffa Joenen, Hanus Jacobsen, Hanna Jensen, Brandur Jacobsen, Hjalti Dalheim, Hans Mourits Foldbo

**Atkvøður ímóti:**
Ólavur Olsen

**Atkvøddi blankt:**
Emma Rasmussen, Jóhan Christiansen

Sostatt er tilmæli hjá minnilutanum í trivnaðarnevndini samtykt.

**23.** **16/00201**
**Góðkenning av roknskapi hjá Nánd fyri 2015**
Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna fyriliggjandi roknskap.

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

# Fundarbók hjá Eysturkommunu
# 520 Leirvík



**Býráðsfundur mánadagin 06. juni 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen, Hans Mourits Foldbo

**Fundurin lokin kl. 23.45**

Jóhan Christiansen ____________________________________________

Hanus Jacobsen ____________________________________________

Hjalti Dalheim ____________________________________________

Oluffa Joensen ____________________________________________

Brandur Jacobsen ____________________________________________

Emma Rasmussen ____________________________________________

Ólavur Olsen ____________________________________________

Hanna Jensen ____________________________________________

Hans Mourits Foldbo ____________________________________________